**Skip til rannsóknir av makrelstovninum fyri Havstovuna frá 26. juni til 21. juli 2017**

Í sambandi við vísindaligar rannsóknir av makrelstovninum í summar, søkir Havstovan eftir nótaskipi at gera rannsóknirnar, sum verður fíggjað við granskingarkvotu. Upp til 1.800 tons av makreli eru sett av at fíggja rannsóknirnar. Kvotan kann fiskast í føroyskum ella altjóða sjógvi, og verður latin sum egin árskvota sambært § 20 í lógini um vinnuligan fiskiskap í 2017. Tíðarskeiðið og krøvini, ið skipið skal lúka, eru lýst niðanfyri.

**Freistin at svara er hósdagin 15. juni 2017 við telduposti til hav@hav.fo**

Tað ella tey reiðarí (skip), ið lúka krøvini, verða biðin um at geva boð uppá, fyri hvønn part av kvotuni, tey kunnu gera rannsóknirnar fyri. Tikið verður av nøktandi tilboði.

**Tíðarskeið**:
Rannsóknirnar verða í tíðarskeiðinum 26. juni til 21. juli 2017. Fyrsta vikan verður brúkt til fyrireikingar; væntandi verður siglt 1. juli. Henda kanningin verður gjørd sum partur av eini felags kanning, har Føroyar, Ísland og Noreg luttaka.

**Krøv til skipið í sambandi við kanningina:**

- Skipið skal hava galdandi veiðiloyvi.
- Ekkólodd: Simrad EK(ER) 60 kHz lodd við bæði 38 og 200 kHz splitbeam botnum.
- Skipið skal hava tóvmegi til at tóva flótitrolið (Vónin 832 m) í vatnskorpuni við upp til 5 míla ferð. Reiðskapur: Eitt (Vónin 832 m MULTPELT) flótitrol við tilhoyrandi útgerð. Lemmar: Injector F-15, 6 $m^2$, 2300 kg.
- Trolveirur: Skipið skal hava flótiveir (Dynema ella líknandi, í minsta lagi 500 m), av tí at tóvað verður í vatnskorpuni. Gjørligt skal eisini verða at tóva djúpari við somu útgerð.
- Skipið skal hava Scanmar og/ella Marport dekkseind og sensorar, ið skulu brúkast til at máta ymsar parametrar á trolinum/lemmunum.
- Skipið skal hava koyggjupláss til fimm fólk frá Havstovuni (fýra kømur).
- Kanningarumhvørvið umborð: Tað skal vera gjørligt at standa innandura og taka sýni av veiðuni. Her skal borðpláss (100x60 mm) vera til mátibretti og elektroniska vekt.
- Internetsamband skal vera umborð, við eini vælvirkandi LAN skipan. EK60 teldan og arbeiðsteldurnar skulu hava samband við netið umborð.
- Á brúnni skal vera arbeiðspláss til tveir granskarar at sita við skriviborð at viðgera tølini frá ekkóloddunum.

**Útreiðslur í sambandi við kanningina:**
Í sambandi við yvirlitstrolingar í summar kann roknast við útreiðslum á umleið kr. 500.000, ið skulu fíggjast yvir kvoturnar, t.e. í sáttmálanum millum Havstovuna og reiðaríið/skipið, sum sáttmáli verður gjørdur við. Útreiðslurnar í sambandi við túrin kunnu fevna um ymsa útgerð í sambandi við kanningarnar umframt útreiðslur í sambandi við siglingina og til viðgerð av data og sýni, sum eru tikin umborð. Endaligu útreiðslurnar verða uppgjørdar eftir túrin.

**Umsóknin skal sendast til:**
Havstovan (hav@hav.fo)
Nóatún 1
100 Tórshavn
**Att: Erling í Liða**